FØROYA LØGMAÐUR

Tinganes, 12. januar 2017

Kæri Bjarni Benediktsson

Vegna Føroya landsstýrið ynski eg tær hjartaliga til lukku við embætinum sum forsætisráðharri Íslands og góða eydnu í komandi stjórnararbeiði tínum.

Tað søguliga góða sambandið millum Føroyar og Ísland er okkum dýrabart. Eg vóni, at vit áhaldandi kunnu menna samstarvið millum lond og fólk okkara, og eg síggi fram til eitt gevandi samstarv við nýggju íslendsku stjórnina. Eg komi at vitja Ísland í vár í sambandi við, at Sendistova Føroya til Íslands heldur sítt árliga flaggdagshald tann 25. apríl.

Um tað liggur fyri, hevði tað glett meg at hitt teg á fundi, meðan eg eri í Íslandi.

Vegna Føroya landsstýri og alt Føroya fólk vil eg nýta høvi at senda eina hjartans tøkk til íslendingar, sum sjálvbodnir fóru undir at veita føroyingum hjálp, tá hørðu ódnirnar herjaðu land okkara um jólini. Tað er rørandi at uppliva slíka umsorgan frá okkara íslendsku vinum.

Bestu kvøður

Aksel V. Johannesen

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo